# Uppfinnsomu Humble Cry



*Humble Cry eru eyðmjúkir, men so sanniliga eisini øðrvísi*

Ungu menninir í Humble Cry høvdu eina áhugaverda og uppfinnsama Kornsert á innipallinum í Kelduni í august mánaði 2007. Teir ungu menninir, sum nú eru vorðnir trý ár eldri, verða við aftur í ár.

Eftir framførslu teirra í 2007 gav Oddur á Lakjuni teimum hetta ummælið á portal.fo:

»Fyrstir at framføra leygardagin vóru nakrir ungir mans úr Meinigheitshúsinum í Havn. Bólkurin Humble Cry var stovnaður í samband við HMU-Kornsertina í mars, og hatta var teirra næsta framførsla.

Tað var popputur rokkur, sum onkuntíð varð meira melankolskur og dapur. Teir byrjaðu eitt sindur trilvandi, men mentu seg sum Kornsertin leið.

Humble Cry er ein nýggjur og rættiliga ungur bólkur, og teir spæla eitt sindur óruddiligt og rótut.

Forsangarin legði fyri við at siga: »Vit fara at hava eina eitt sindur snediga Kornsert«. Og har vóru onkur heldur annarleiðis ting við. Á pallinum stóð ein hvítur krossur. Tríggjar gentur í hvítum fóru ímillum fólkini at savna bønarevni inn á gulum lepum, og so vórðu hesir klistraðir uppá krossin. Genturnar lógu so á knæ og bóðu fyri hesum alla Kornsertina.

Allir sangirnir uttan ein vóru á enskum. Tekstirnir vóru til tíðir á nokkso undarligum enskum. Tað snúði seg um trupulleikar og tankar, sum tanáringar hava, serliga um tað at vera kristin.

Gittarin var allatíðina fremst í ljóðmyndini. Í sanginum »Black Holes Holy« sang gittarspælarin Sámal Jákup við hásari rokkrødd. Hetta var nokk besti sangurin. Í endanum spældi hann eisini blokkfloytu afturvið melankolska rokkinum. Og í seinasta sanginum var tað sum at hoyra Faith No More við »Easy"«. Fjølbroytt.

Tað var ikki polerað spæl, men tað var fjølbroytt og uppfinnsamt, og tað menti seg til eina spennandi og annarleiðis Kornsert. Um teir halda seg til, kunnu teir uttan iva blíva heilt góðir.

**Humble Cry fara enn einaferð á pall í Skálafirði á »Føroyakvøldinum«, leygarkvøldið kl. 21:15.**

---



*Ásbjørn Berthelsen av Strondum stjórnar Vox*

# Gospelkórið VOX við á Fjarðafestivalinum

**FJARÐAFESTIVALURIN** Vox er kór, ið hevur savnað saman nógvar góðar røddir úr samkomum í Føroyum. Í mong hevur kórið bergtikið. Vox verður at hoyra á Fjarðafestivalinum 2010

Dagfinn Olsen

Vox er eitt gospelkór, sum í 12 ár hevur sungið og framført á møtum og Kornsertum.

Vox hevur ferðast í nógvum tónleikastílum. Mest hevur tað verið nútíðar gospel við íblástri úr Ameriku, men eisini hevur lættari kórtónleikur og jazzur verið á sangskránni.

Leygarkvøldið á Fjarðafestivalinum fer Vox at hava eina Kornsert, har kórið bæði syngur nýggjar sangir, og sangir, sum tey hava sungið fyrr. Stílurin er blandaður, lívligt og meira friðarligt.

Í VOX eru 12 sangarar og 4 tónleikarar. Kórleiðari er Ásbjørn Berthelsen.

dagfinn@sosialurin.fo

**Vox fer enn einaferð á pall í Skálafirði á »Føroyakvøldinum«, leygarkvøldið kl. 18:45.**